STARVSLÝSING

# Skrivstovufólk

Landsverk søkir eftir einum skrivstovufólki til starvsfólkadeildina. Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkarøkt, skrivstovuumsiting og aðrari umsiting.

**Arbeiðsøkið**
Tú fært ábyrgd av øllum móttøkuuppgávum og innanhýsis tænastum. Harumframt verður tú við í øðrum arbeiðsuppgávum á deildini.

**Førleikakrøv**
Tú hevur skrivstovuútbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndir.

Tú sýnir eisini tænastusinni, nærlagni og ágrýtni, ert fyrikomandi og dugir væl at málbera teg. Tú hevur teldukunnleika á brúkarastigi. Upplæring í serskipanum verður givin á staðnum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juli kl.12.00. Merk umsóknina „Umsókn til Starvsfólkadeildina“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Elsu Johonnu Høgenni, starvsfólkaleiðara, á 340 800 ella ejh@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

# Starvsfólk til Mylnuna



Søkt verður eftir pakkifólki at arbeiða í Mylnuni, at byrja beinanvegin. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Hevur tú spurningar ert tú vælkomin at ringja á tel 214456.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær…

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.



Billund og Aalborg
/ Prísur úr :
# 11.995,-

# Pakkaferð til Billund og Aalborg fyri alla familjuna við bili

Íroknað prísin er flogferð aftur og fram fyri tvey vaksin, tvey børn undir 12 ár og bilur í 1 viku. Bilurin stendur og bíðar eftir tykkum á flogvøllinum.

Tit gera sjálvi av, hvat tit vilja síggja og uppliva. Í Jyllandi eru nógv spennandi tilboð til familjuna, og vit hjálpa fegin at finna hotell, um tørvur er á tí.

Les meira á www.atlantic.fo

Bílegg á telefon 341010 hjá Atlantic Airways ella á tínari ferðaskrivstovu. Tilboðið er galdandi frá 1. juli til 31. august 2008.



ATLANTIC AIRWAYS

– á føroyskum veingjum í 20 ár

atlantic.fo / Tel 34 10 40